# Arbeiðsark 3: Dansa dansa dansa!

**Uppgáva 4: Ein dansiupptøka**

Vit hava fingið ein komponist til at gera eitt stykki av tónleiki til filmin.

Heinta tað frá Nordeniskolen.org og lurta eftir tí saman í bólkinum. Hvat fær tónleikurin tykkum at hugsa um? Nú skulu tit gera ein dans til. Tá tit halda at dansurin er vorðin rættliga góður, skulu tit gera eina filmsupptøku av tí.

**Reglurnar eru:**

- Brúkið **tónleikin hjá komponistinum**!
- Finn eitt spennandi 'location' til tykkara dans. Hugsa um støð, har man vanligvis ikki sær fólk dansa (t.d. einum handli, einum skógi, einari svimjihøll). Tað kann eisini verða eitt location, sum er serstakt fyri tað stað, sum tit búgva (hugsa um, at onnur børn frá Norðurlondum kunnu enda við at síggja tykkara uppseting).
- Myndatólið má ikki flyta seg. Tit kunnu tildømis seta tað á eitt stativ ella á eitt borð. Á filmsmálið kallar man tað fyri 'fikserað myndatól'.

**Aftur í flokkinum:**

Vísi hvørjum øðrum tykkara dansiupptøkur. Hvørji location hevur bólkurin valt, og hvørja funktión hevur tað? Hvat huglag kemur man í av at síggja dansin?

**Uppsendi**

Nú er tíðin komin til at uppsenda tykkara upptøkur og myndir til Nordeniskolen.org. Fylgi vegleiðingini á síðuni. Tit skulu uppsenda:

- 1 Upptøku av gongutúrinum (ark 1)
- 3 myndir av mynstrum (ark 1)
- 3 portrettir (ark 2)
- 1 dansiupptøku (ark 3)